**Fólkaflokkurin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 64/2016: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (botnfrádráttur í kommunuskattinum)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landskatt og kommunuskatt (Skattalógin)

(botnfrádráttur í kommunuskattinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Hjúnafelagar verða hvør sær settir sjálvstøðugt í skatt av inntøkum sínum. Um skattskyldug inntøka hjá øðrum hjúnafelagnum er undir skattafría botnfrádráttin í kommunuskattinum og hjá hinum yvir, verður ein javning gjørd, so at tann lægra inntøkan verður hækkað við upp til ásetta skattafría botnfrádráttin hjá kommununi, og tann hægra verður lækkað samsvarandi.”

**2.** Í § 46, stk. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýggj pkt. sett:
“Frá 1. januar 2018 kunnu bygda(r)ráð-ini avgera at hækka upphæddina í 2. pkt. soleiðis, at eingin kommunuskatt-ur verður álíknaður skattskyldugu inntøkuni upp til 65.000 kr. Upphæddin skal verða samtykt av bygda(r)ráðnum fyri 1. desember, galdandi fyri komandi inntøkuár.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**

Við verandi lóggávu kunnu kommunur sjálvar áseta skattaprosent og barnafrádrátt. Enda-málið við hesum uppskoti er, at kommunur eisini fáa heimild at hækka botnfrádráttin í kommunuskattinum.

Vanliga hevur botnfrádrátturin í landsskatti og í kommunuskatti verið tann sami. Við flat-skattinum var botnfrádrátturin í landsskattinum hækkaður úr 30.000 kr. heilt upp í 65.000 kr., so eingin inntøka undir 65.000 rindar nakað í landsskatti, ein stórur bati fyri 1000-tals føroyingar við teimum allar lægstu inntøkunum. Hesi hava síðan flatskattin ongan bata fingið, og Fólkaflokkurin heldur, at tíðin nú er komin.

Av tí, at allar lægstu inntøkurnar bert rinda kommunuskatt, er neyðugt at gera broytingar her, og bert botnfrádrátturin í kommunskattinum kann røkka endamálinum.

Botnfrádrátturin í kommuskattinum er 30.000 kr, og við hesum uppskoti verður heimilað kommunum at hækka botnfrádráttin. Botnfrádrátturin í kommunuskattinum kann eftir uppskotinum ásetast millum 30.000 kr. og 65.000 kr. Ynskiligt hevði verið, at kommmurnar

líðandi hækkaðu botnfrádráttin upp til 65.000 kr., sum er sama støði, sum botnfrádrátturin í landskattinum er.

Hetta fyri at tey allar lægstløntu eisini fáa ein bata.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Eingin beinleiðis fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum. Í lógaruppskotinum fáa kommunurnar bert møguleika fyri at hækka botnfrádráttin – botnfrádrátturin hækkar ikki sjálvvirkandi.
Men fyri at vísa á, hvat ein møguligur kostnaður verður, kann sum dømi nevnast, at um allar kommunurnar hækka botnfrádráttin við 1.000 kr., vísir ein leyslig meting, at hetta merkir á leið 8 mió. kr. í mistum inntøkum fyri kommunurnar.

**Serligar viðmerkingar**
<u>Til § 1, nr. 1:</u>
Í galdandi lóg er ásett "...so at tann lægra inntøkan verður hækkað við upp til kr. 30.000...". Av tí at broyting verður framd í § 46, stk. 1 soleiðis, at heimild verður givin kommunum at hækka botnfrádráttin, verður § 4, stk. 1 umorðað soleiðis, at ein ávís upphædd ikki verður ásett. Við hesum uppskoti, verður tann lægra inntøkan hækkað við upp til ásetta skattafría botnfrádráttin hjá kommununi.

<u>Til § 1, nr. 2:</u>
Møguleiki verður givin bý- og bygdaráðunum at hækka sokallaða botnfrádráttin í kommunu-skattinum upp til 65.000 kr. Heimilað verður ikki at lækka botnfrádráttin undir 30.000 kr., men bert at hækka hann frá 30.000 kr. og upp til í mesta lagi 65.000 kr. Botnfrádrátturin kann hækka frá 1. januar 2018.
Bý- og bygdaráðini skulu góðkenna broytingina í upphæddini áðrenn 1. desember árið fyri, broytingin kemur í gildi.

<u>Til § 2:</u>
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingið, 22. februar 2017**

Jørgen Niclasen
løgtingsmaður